# Stjørna í tvey kvøld í Føroyum



Guðrun Sólja Jacobsen hevur verið nógv frammi í Danmark síðstu vikurnar, men um vikuskiftið fer hon at syngja á tveimum konsertum í Føroyum

**Um vikuskiftið fer Guðrun Sólja Jacobsen at syngja á tveimum konsertum í Havn og í Fuglafirði. Konsertirnar eru í sambandi við, at hon hevur givið nýggja fløgu út**

Um vikuskiftið fer Guðrun Sólja Jacobsen at hava tvær konsertir í Føroyum. Tær verða á dansistaðnum Rex í Havn og í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Tað hevur verið nógv á skránni hjá Guðrun í Danmark seinastu tíðina. Hon gav fyrst í februar mánaði nýggja fløgu út, og hon hevur gjørt pr-arbeiði í sambandi við fløguna. Sølan av fløguni hevur gingið væl bæði í Danmark og í Føroyum, og tað ger stóran mun í Danmark, at fløgan hevur verið førd fram í sjónvarpslýsingum.

Á nýggju fløguni eru tulkingar av kendum sangum, men onkur einstakur nýggjur sangur er eisini á fløguni.

## Úr at gera

Umframt nýggju útgávuna hevur Guðrun Sólja Jacobsen eisini verið nógv frammi í sambandi við kappingina Stjørna eitt kvøld, sum DR hevur skipað fyri seinastu vikurnar.

Guðrun kom allan vegin í finaluna, og hóast hon hevði eina sera góða framførslu í finlauni, vann hon ikki fram millum tey trý fremstu í kappingini.

Nú hevur Guðrun aftur stundir at koma heim til Føroya at hava konsertir, og um vikuskiftið verður møguleiki at hoyra hana syngja í Havn og í Fuglafirði.

Fríggjakvøldið 11. mars syngur Guðrun í Rex í Havn, og leygarkvøldið 12. mars verður hon at hoyra í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

## Showmenn spæla við

Síðsta summar hevði Guðrun Sólja Jacobsen onkra framførslu í Føroyum, har tónleikararnir í Showmonnum spældu undir hjá henni, og tað samstarvið eydnaðist so væl, at tað verður endurtikið næsta vikuskiftið.

Til tiltakið í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, sum er bæði konsert og dansur, fara Showmenn eisini at spæla til dans part av tíðini.

Forsøla til konsertina í Mentanarhúsnum er á Shell-støðunum kring landið, og til tiltakið á Rex ber til at keypa atgongumerki í forsølu á Kunningarstovuni í Havn.


Sosialurin
Sosialurin
i



GUÐRUN SÓLJA JACOBSEN
saman við SHOWmonnum



FRÍGGJAKVØLDIÐ 11. MAR.
Atgongumerki í forsølu í
Kunningarstovuni í Havn
REX